FA hevur ikki lýst landara-verkfall enn

Havsbrún: — Meðaltímaløn fyri seinasta árið er kr. 189. Teir, sum vóru við alla tíðina kundu tjena kr. 147.000

Einki landara-verkfall varð sett í verk á miðnátt hósdagin og Føroya Arbeiðarafelag hevur enn ikki lýst nakað verkfall.

FA kundi í gjár ikki upplýsa nakað um, um felagið fór at lýsa verkfall ella ikki. Semingsmaðurin Jákup í Gerðinum hevði annars útsett eitt møguligt verkfall til hósdagin.

Semingsmaðurin hevur ikki viljað sett nakað semingsuppskot fram, tí partarnir hava staðið so langt frá hvørjum øðrum.

Leysatíðindi, sum vit ikki hava fingið váttað, bendu á, at semingsstovnurin fór møguliga at kalla partarnar inn til ein fund í gjár.

Annars er støðan í løtuni hon, at einki skip er væntandi til sildaverksmiðjuna í næstum. Tí er tað avmarkað, hvørjar avleiðingar eitt landara-verkfall fær í fyrstu syftu.

Umframt landararnar luttaka triggir mans í arbeiðnum á landi — ein vektarmaður, ein kranførari og ein ansar eftir tangunum. Hesir eru ikki undir akkordini hjá landarunum, men koma undir vanliga sáttmálan hjá FA.

Í einum skrivi til Sosialin sigur stjórin á Havsbrún, Andreas Lava Olsen, at summi av teimum tølunum, sum hava verið nevnd í samband við lønirnar hjá landarunum, eru tikin burtur úr tí samanhangi, tey hoyra heima, og kunnu tí skapa misskiljingar.

Tí heldur Havsbrún, at tað er neyðugt at koma við hesum upplýsingunum:

Tað nýggjasta taltilfarið, sum fevnir um 12-mánaða tíðarskeiðið frá 1. juni 1980 til 1. juni 1981, sýnir í tíðarskeiðnum landingarlønir upp á tilsamans 2.661.146 kr. Hetta er við tímaløn fyri bíðitímar, akkord, dýrtíðar- og yvirtíðarviðbót til akkordina og frítíðarløn.

Fiskanøgdin fyri hetta tíðarskeiðið er tann sama sum fyri árið 1980 og tann sama, sum vit væntа fyri 1981, um lodnan kemur til virkið í somu nøgd sum í fjør.

Luttakaratalið í landingarakkordini hetta tíðarskeiðið hevur verið upá 18 manns (3 landingarlið á 6 manns).

Landingarlønin í hesum tíðarskeiði svarar til 147.841 kr. fyri eitt tímatal uppá 781 pr. luttakara.

Nakrir av akkordluttakarunum røkka hesa ársløn.

Onkur fer upp um, tí hann umframt luttekur í hinum landingarliðunum.

Luttakarar, sum av einihvørji orsøk ikki eru við til allar landingarnar í liðnum, fáa sjálvsagt samsvarandi minni burtur úr.

Fyri allar landingar undir einum í nevnda tíðarskeiði er meðaltímaløn 189,26 kr. fyri landingararbeiðið.

Tað skal viðmerkjast, at landingarløninrnar bert eru undir fyrisæti av Havsbrún. Tað eru skipini, sum gjalda landingarútreiðslurnar.

Ger fyrireikingar-arbeiði til havnaútbygging

Sambindingarvegur millum Drelnes og høvuðsvegin á Tvøroyri verður eisini fyrireikaður



Innanfyri Drelnes, har saltgoymsla nú er skal ferjulega gerast

Tvøroyrar kommuna er so smátt farin at fyrireika tað nýggja havnalagið við ferjulegu á Drelnesi á sunnaru síðu á Trongisvágsfirði.

Træbrúgvin, sum hevur verið innan fyri keikisturnar, er tikin burtur, og grót verur nú fylt í hylin millum keiina og land.

Landsverkfrøðingurin hevur gjørt tekningar til tað nýggja havnalagið, sum tó ikki er projekterað enn. Sambært tekningunum verður atløgubryggjan fram við landi, men ikki í flukt við núverandi atløgukant. Tað verður eitt knæ í, og her skal ílandkoyringin frá Teistanum vera.

Umframt ferjulegu fevnir ætlanin eisini um stórt parkerings- og goymsluøki.

Greitt við ríkisstudninginum

Nær farið verður undir havnalagið á Drelnesi er ikki greitt enn, við tað at tað er ógreitt viðvíkjandi ríkisins parti av figgingini. Vanliga verða havnir figgjaðar við 50 pst. í studningi frá landskassanum og 25 pst. í studningi frá ríkiskassanum, meðan kommunurnar sjálvar figgja tey íverandi 25 pst.

Á havnaætlanini hjá løgtinginum hevur Tvøroyrar kommuna fingið tillutaðar 12 mill. kr.

Tað hevur verið ógreitt við danska stuðlinum til havnabygging í Føroyum nú í eina tíð. Eingin greið frágreiðing er komin, hví ríkið er trekt at lata studning, men fyrr í summar upplýsti Torbjørn Poulsen fyri Sosialinum, at spurningurin verður viðgjørdur á embætismannastigi, og fanst eingin loysn í summar, fór landsstýrið at viðgera spurningin, tá Anker Jørgensen, forsætisráðharri, væntandi kemur á vitjan í august.

Stór vegaætlan

Upp í havnaætlanina á Drelnesi er eisini tengt eitt stórt vegaprojekt, sum gongur frá el-verkinum í Trongisvági, tvørtur um Stóra eystan fyri núverandi brúgv og framvið núverandi landsvegi út á Drelnes.

Kommunan er farin í holt við at útvega grót til hendan vegin. Tað verður tikið við bergholsmunnan í Trongisvági. Haðani verður eisini grót tikið til ifyllingina á Drelnesi.

Nú nýggjur landsvegur verður gjørdur av Drelnesi, arbeiðir kommunan eisini við at fáa tann ovara vegin millum Tvøroyri og Trongisvág bundnan í nýggja landsvegin við el-verkið, samstundis sum landsvegurin verður gjørdur. Projekt fyri innara endan úr Svaldbard, har vegurin nú endar, og til el-verkið er gjørt, meðan enn eingin støða er tikin til, hvar uttari endi av vegnum skal førast oman til núverðandi høvuðsveg.

Liðugur næsta ár

Tað gongur væl at gera vegin millum Hattarvík og Kirkju. Strekkið er einar fýra kilometur og hálvurannar kilometur er eftir. Ætlanin er, at vegurin skal vera komin til Kirkju einaferð næsta ár. Tað eru trý ár síðan vegarbeiðið úti í Fugloy byrjaði.

Háskúlafundur í Havn

— Norðurlendskir lærarar skula á skeið um føroyska søgu og mentan. Fara eisini útferðir og fiskitúr við sluppini

Við Smyrli í morgin koma 50 háskúlalærarar úr Noregi, Svøriki, Finnlandi og Danmørk at vitja Føroya Fólkaháskúla.

Tað er Nordisk Folkhøgskoleråd, sum saman við háskúlanum her skipar fyri einum skeiði fyri háskúlalærarar við evninum »Føroysk søga og mentan«.

Norrøna fólkaháskúlaráðið skipar á hvørjum ári fyri einum fundi, har háskúlalærarar úr øllum Norðanlondum hava høvi til at hittast og tosa um ymsar spurningar háskúlum viðvíkjandi. Hesir fundir ganga uppá umgang millum øll Norðanlond, og eru aloftast samstundis skipaðir sum eitt skeið við ávísum evni, hesaferð um Føroyar.

Sjálvt skeiðið byrjar hósdagin 30. juli og viðgerð hesi evni: Føroya søgu, Føroya politiska støða í dag, føroyskar bókmentir, føroyskt trúarlív, føroyska list, føroyskt vinnulív fyrr og nú, fjølmiðlar í Føroyum, føroyskur dansur.

Skipað verður fyri ymsum útferðum og einum fiskitúri við sluppini.

Formaður í Norrøna Háskúlaráðnum er danin Frederik Christensen frá Vrå Højskole. Hann flytur røðu á fólkafundinum á háskúlanum ólavsøkuaftan.